## Gunnar aftur í EB/Streymi

Eftir eitt ár á Toftum hevur Gunnar á Steig aftu gjørt sáttmála við EB/Streym. Gunnar, sum annars er klaksvíkingur, var í seks ár knýttur at EB/Streymi. Tey fyrstu knøppu fýra árini sum fyrstimálverji, men tá hann sleit hælsinuna fekk EB/Streymur fatur á René Tórgarð, og hann hevur so verið fyrsta val síðani. Gunnar vardi í fjør málið hjá B68, sum vann kappingina í 1. deild, men nú er hann so aftur í EB/Streymi.



## Stjørnu-bussar

Eins og hjá StÍF, so eru tey í Stjørnuni eisini hampuliga von við at skipa fyri útferð og upphiting til steypafinalu. Tað gera tey eisini hesaferð, og á Norðlýsinum verðu sagt frá, at bussar koyra úr KÍ høllini klokkan 11 leygardagin. Meldast skal tó til ferðina, og eigur hetta at verða gjørt í seinasta lagi fríggjakvøldið.

# Triðja finala móti StÍF

**Um vikuskiftið verða steypafinalurnar í hondbólti spældar, og hjá monnunum eru tað Kyndil og StÍF, ið bresta saman. Kyndil hevur vunnið kappingina flest ferðir, við átta sigrum, men seinastu nógvu árini hava StÍF hála seg upp á seks finalusigrar. Bæði liðini eru von at vinna, og hava royndir á hesum støði, so tað verður eitt brak**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Janus Einar Sørensen metir at StÍF eru stór favorittar, men hann og liðfelagar hansara ætla sær at vinna*

Fyri triðju ferð bresta tey bæði mest vinnandi liðini í føroyskari steypasøgu saman, og báðar tær undanfarnu ferðirnar hava havnamenn drigið longra stráðið (í 1995 og 2003), men í ár mugu strandingar metast sum stórir favorittar.

### Greiður favorittur

Sambært Janusi Einar Sørensen hjá Kyndli, er ongin ivi um at gestirnar av Strondum eru favorittar í steypafinaluni um vikuskiftið.

- Teir hava hølvað okkum av í fleiri dystum, fyrr í ár, og tískil mugu teir av røttum, metast sum favorittar, sigur Janus Einar Sørensen, ið er ein av royndu leikarunum á Kyndlaliðnum.

### Gjøgnumbrotið hjá Janusi

Janus Einar er vorðin 27-ára gamal, og hann hevur nógvar royndir á besta Kyndlaliðnum. Mangan hevur hann bart og tikið tey tungu tøkini, men soleiðis er at vera strikuspælari.

Í kappingarárinum 1999-2000 hevði Janus Einar sítt stóra gjøgnumbrot, og serliga í steypafinaluni móti grannunum úr Neistanum minnist hann aftur á við stórari gleði.

Kyndil vann finaluna við tveimum málum 22-20, men tað sá ikki ov væl út hjá teimum grønlittu allan dystin. Janus minnist aftur, at venjarin Sofus tók timeout, tá 16 minuttir vóru spældir av øðrum hálvleiki, tí tá vóru Kyndil aftanfyri Neistan við átta málum. Eftir hetta byrjaðu kyndilsmenn at skora, meðan neistamenn hinvegin byrjaðu at brenna, og heilt skjótt vendist eitt hóttandi tap, til gleðisróm av teimum heilt stóru, og sjampanjuproppparnar poppaðu upp úr øllum heraðshornum.

- Tað var ein fantastisk løta, og heilt víst nakað, eg altíð fari at minnast aftur á, sigur Janus Einar, og leggur afturat, at hann onki hevur ímóti at endurtaka hetta bragd móti StÍF.

### Nervarnir hanga uttaná

Janus Einar ásannar, at nervarnir eru millum leikararnar, og tað skulu tað helst eisini vera, sigur hann. Hann sigur eisini at leikararnar gleða seg, til nokk størstu einstøku føroysku ítróttarhendingina, og at um sigurin skal hálast heim, so skulu teir standa sterkir í verjuni, tí tað er oftast haðani, at grundarlagið verður lagt fyri einum sigri. Hann vil ikki útnevna nakran serligan leikara á liðnum sum profil, men vil heldur siga, at teir hava nakrar spennandi streingir at spæla á.

Viðvíkjandi mótstøðuliðnum, metir Janus Einar, at teir skulu hugsa seg væl um, og vera kaldir í avgerandi løtunum, um teir skulu kunnu koma gjøgnum sterku bakketuna hjá StÍF.

Janus Einar er sannførdur um, at tá dysturin er liðugur leygardagin, tá eru tað kyndlamenn, ið fegnast um enn ein finalusigur. Livst so spyrst.

### Finalur frá 1984-2006

| Ár | Dystur | Úrslit |
|---|---|---|
| 1985 | VÍF-Kyndil | 32-24 |
| 1986 | Kyndil-KÍF | 24-23 |
| 1987 | Kyndil-Neistin | 21-14 |
| 1988 | VÍF-Kyndil | 16-15 |
| 1989 | VÍF-Kyndil | 21-19 |
| 1990 | Kyndil-VÍF | 19-18 |
| 1991 | Kyndil-Neistin | 22-17 |
| 1992 | Neistin-Kyndil | 15-14 |
| 1993 | VÍF-Neistin | 22-18 |
| 1994 | Neistin-VÍF | 25-24 |
| 1995 | Kyndil-StÍF | 32-24 |
| 1996 | Kyndil-VÍF | 29-18 |
| 1997 | VÍF-Kyndil | 25-21 |
| 1998 | H71-Kyndil | 23-20 |
| 1999 | VÍF-StÍF | 24-23 |
| 2000 | Kyndil-Neistin | 22-20 |
| 2001 | StÍF-VÍF | 32-29 |
| 2002 | StÍF-Neistin | 30-28 |
| 2003 | Kyndil-StÍF | 26-25 |
| 2004 | StÍF-H71 | 34-30 |
| 2005 | StÍF-VÍF | 28-23 |
| 2006 | StÍF-VÍF | 24-22 |
| 2007 | StÍF-VÍF | 26-25 |

### Vinnarar 1984-2006

| | |
|---|---|
| Kyndil | 8 |
| VÍF | 6 |
| StÍF | 6 |
| Neistin | 2 |
| H71 | 1 |